# – Vit eiga at gera meira við kvinnugransking

**- Í Føroyum eru umleið 2000 færri kvinnur enn menn, meðan lutfallið millum føroyingar í Danmark er júst øvugt. Men vit vita einki um, hví so er. Millum annað í slíkum áttu vit at granska meiri, sigur Annita á Fríðriksmørk**

FLOKSTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Annita á Fríðriksmørk heldur, at vit vita alt ov lítið um kvinnusakir. Og tí eigur stórur dentur at verða lagdur á gransking av hesum.*

Sum flestu av hinum tingfólkum Tjóðveldisfloksins helt eisini Annita á Fríðriksmørk røðu á flokstinginum farna vikuskiftið.

Eins og formaðurin, Høgni Hoydal, legði Annita stóran dent á týdningin av, at Føroyar fáa fullveldi í komandi valskeiði. Hon vísti á týdningin av, at vit fáa statsrættarligt eins væl og persónligt frælsi.

Serliga stóran dent legði tingkvinnan á umstøðurnar hjá einligum uppihaldarum, og týdningin av, at vit kenna betur til umstøður teirra.

– Vit vita, at nógvir einligir uppihaldarar flyta til Danmarkar, men vit vita ikki hví. Tað kann sjálvandi vera, at fleiri teirra fara til Danmarkar í lestrarørindum, vit vita tað bara ikki. Og tí eiga vit at leggja dent á gransking á hesum øki, sigur Annita á Fríðriksmørk.

Korini hjá einligum uppihaldarum í Føroyum kunnu eisini vera ein orsøk til, at fleiri fara av landinum. Til dømis fær ein einligur uppihaldari, ið forvinnur 21.000 kr. um mánaðin, ongan almennan stuðul sum eitt nú frítt barnagarðspláss, bústaðarshjálp o.a.

Í Føroyum búgva 2000 fleiri menn enn kvinnur, men heldur ikki á hesum øki vita vit, hví so er. Talið á føroyingum, sum búgva niðri í Danmark er beint øvugt, har finnast smáar 2000 fleiri kvinnur enn menn.

### Kvinnugransking

Men tað eru so nógv øki, har vit áttu at farið undir eina miðvísa gransking, fyri at finna útav, hví viðurskiftini eru sum tey eru, tá tað um kvinnur ræður.

– Vit vita til dømis, at kvinnurnar forvinna ein triðing av øllum inntøkum í landinum og menn tveir triðingar. Men vit vita einki um, hví lutfallið er soleiðis, sigur Annita.

Hon vísir eisini á, at kvinnur í nógvum førum verða valdar frá í Føroyum. Og hetta er eitt fyribrigdi, ið átti at verið hugt nærri at.

– Eg kann nevna eitt dømi, har landsstýrið fyri tíð síðani skuldi velja 30 umboð í nevndir hjá almennum partafeløgum. Landsstýrið valdi 30 menn og onga kvinnu, vísir tingkvinna Tjóðveldisfloksins á.

Hon heldur eisini, at formellu orðingarnar í sambandi við ymisk størv, altíð nýta orðið »maður«.

– Vit kunnu nevna orðini tingmaður, løgmaður, landsstýrismaður og Løgtingsins Umboðsmaður. Sagt verður, at orðið maður er galdandi fyri bæði kvinnu og mann – og so kunnu vit allernádigst sleppa at eita neytakona ella vaskikona; flakakona gongur eisini, sigur Annita á Fríðriksmørk.

### Prestiguprojekt

Tjóðveldiskvinnan nam eisini við spurningin um yvirtøku av Fólkakirkjuni. Sjálvandi eigur kirkjan at verða føroysk, heldur hon, men tað harmar hana samstundis, at vit hava spilt trý ára arbeiði upp á at fyrireika eina yvirtøku, nú vit ikki vilja nýta hetta arbeiði kortini.

Tað er heldur eingin loyna, at kreftir í Kirkjuliga Fylgibólkinum mæla frá einari yvirtøku av Fólkakirkjuni longu á Ólavsøku.

– Vit mugu gera alt fyri, at kirkjan ikki gerst eitt politiskt prestiguprojekt, men verður yvirtikin í samráð við kirkjuliga landslagið og í samstarvi við allar flokkar á tingi, sigur Annita á Fríðriksmørk.

---

# Nú dreyar tað seg bert um felagið

**Teir hava arbeitt við einum áhugafelagi í eina tíð, men eru nú av álvara farnir til verka - teir føroysku trædreyararnir. Felagið varð stovnað í november mánaði í fjør, og í dag eru longu 26 limir í felagnum**

FELAG
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tað var longu á sumri fyri tveimum árum síðani, at hugskotið til eitt slíkt felag birtist. Hetta hendi í sambandi við eitt skeið í dreying á Tekniska Skúla í Klaksvík.

Nakað eftir hetta varð hildin ein fundur, har nakrir av áhugaðu limunum hittust aftur - hesaferð á Felagsskúlanum á Oyrarbakka.

Eftir henda fundin varð ein arbeiðsbólkur settur at taka sær av fyrireikingunum til at seta eitt felag á stovn.

Í hesum arbeiðsbólki vóru Brynjolvur Borðoy, Terji Johannesen og Hendrik Rubeksen. og varð teirra uppgáva at fáa í lag eitt føroyskt dreyarafelag.

### Íslendsk fyrimynd

Teir arbeiddu íðnir við hesi ætlanini, og hin 26. november í fjør kallaðu teir inn til stovnandi aðalfund á Oyrarbakka.

Á fundinum løgdu teir fram uppskot um felagslógir, sum vórðu gjørdar eftir íslendskari fyrimynd. Teir fingu nevniliga eitt eintak av lógunum fyri einum líknandi felagi fyri trædreyarar í Íslandi.



*Trædreying er gamalt handverk, og nógv vakurt kann fáast burtur úr (savnsmynd)*

- Á hesum fundinum vóru 12 áhugaðir dreyarar. Og hesir samtyktu okkara uppskot við smærri broytingum, upplýsir formaðurin í felagnum, Hendrik Rubeksen.

Saman við honum sita hesir í nevndini: Heri Mørkøre sum er kassameistari og Piddi Lamhauge sum er skrivari.

Felagið hevur sum nevnt 26 limir og fer í næstu framtíð at skipa fyri onkrum tiltaki fyri limirnar í Felagsskúlanum á Oyrarbakka.

- Vit vilja fegnir hava fleiri limir í felagið, og kunnu teir tekna seg onkrum av okkum í nevndini, sigur formaðurin í felagnum. Limagjaldið er 200 kr. um árið.

## Vítt fevnt endamál

Nú Dreyarafelagið av álvara hevur lagt til brots, er tað við einum víttfevndum endamáli at virka fyri.

Í fyrsta lagi ynskir felagið at økja og bøta um trædreying í Føroyum, við tí fyri eyga at vekja felags áhuga millum tey, sum hava tilknyti til hesa listina.

Endamálið er at koma við upplýsingum og halda skeið um tað nýggjasta innan dreying her á landi og í londunum rundan um okkum. Felagið ynskir eisini at fremja samstarv við líknandi feløg uttanlands.

Virkast skal eisini fyri, at limirnir kunnu hava framsýningar og at teir sleppa at kappast sínámillum, og at teir fáa møguleika at útvega sær bíligt tilfari til dreying og at gera sítt til at teir fáa keypt røttu bonkrarnar og annað tilfar og amboð.

Felagið ynskir somuleiðis at seta á stovn eitt bókasavn ella savn av filmum ella sjónbondum, og at geva limunum upplýsingar um útbúgvingarmøguleikar, bæði fyrireikingarskeið og skúlar.

At enda ynskir Dreyarafelagið at veita almenninginum, sniðgevum og øðrum upplýsingar um tænastu, sum limirnir veita, eins og endamálið er at halda arbeiðsfundir, har limirnir hitast at tosa saman, m.a. um serstakar samanrenningar av trædreying og list.

Felagið hevur enn bara 26 limir. Men við eini so spennandi endamálsskrá er lítil ivi um, at felagið skjótt fær fleiri limir.